## Hósdagur 4. januar

### SVF

| | |
|---|---|
| 18.50 | Tá feittið skal burtur – um venjingar og motión |
| 19.20 | Ítrótturin heima (e) |
| 20.00 | Dagur og Vika við Grannum okkara |
| 20.50 | Hotellið 4 – donsk dramarøð |
| 21.30 | Roomservice – íbúðin verður broytt |
| 22.00 | Taggart – skotskur kriminalfilmur |
| 00.05 | Liðugt |

### EURO SPORT

| | |
|---|---|
| 07:30 | Rally |
| 07:45 | Nordic combined skiing |
| 08:30 | Ski jumping |
| 10:15 | Live biathlon |
| 11:45 | Figure skating |
| 13:30 | Live tennis |
| 17:00 | Ski jumping |
| 18:30 | Biathlon |
| 19:30 | Football |
| 20:30 | Boxing |
| 21:30 | Rally |
| 22:00 | News |
| 22:15 | Ski jumping |
| 23:45 | Rally |
| 00:15 | News |
| 00:30 | Close |

### BBC PRIME

| | |
|---|---|
| 00.00 | TLZ: »Watergate – Cover up« |
| 01.00 | TLZ: »Science at War – The Laboratory of War« |
| 02.00 | TLZ: »Julius Caesar« |
| 04.40 | TLZ: »The Ancient Mariner« |
| 05.00 | TLZ: »The Business Hour« |
| 05.30 | TLZ: »Follow through« |
| 06.00 | The Further Adventures of Superted: »Spotty Earns His Stripes« |
| 06.30 | Playdays |
| 06.50 | Dear Mr. Barker |
| 07.05 | The Really Wild Show |
| 07.30 | Ready, Steady, Cook |
| 08.00 | Style Challenge: »Singers« |
| 08.25 | Change that: »Portsmouth« |
| 08.50 | Going for a Song |
| 09.30 | Top of the Pops Specials: »Pulp« |
| 10.00 | Antiques Roadshow: »Selby« |
| 10.30 | TLZ: »Promised Land – More angry than afraid« |
| 11.30 | Looking good: »Pick Me Show« |
| 12.00 | Ready, Steady, Cook |
| 12.30 | Style Challenge: »Sixties/Nineties Swap« |
| 13.00 | Doctors |
| 13.30 | EastEnders |
| 14.00 | Change that: »Portsmouth« |
| 14.25 | Going for a Song |
| 15.00 | The Further Adventures of Superted: »Spotty Earns His Stripes |
| 15.30 | Playdays |
| 15.50 | Dear Mr. Barker |
| 16.05 | The Really Wild Show |
| 16.30 | Top of the Pops Global |
| 17.00 | Home Front |
| 17.30 | Doctors |
| 18.00 | EastEnders |
| 18.30 | Wildlife: »Hippos Out of Water« |
| 19.00 | Fawlty Towers: »Communication Problems« |
| 19.30 | Murder most Horrid: »Frozen« |
| 20.00 | Casualty: »Travelling Light« |
| 21.00 | How do you want me?: »White Pubic Hair« |
| 21.30 | Top of the Pops Global |
| 22.00 | Dalziel and Pascoe: »Exit Lines« |
| 23.35 | Dr. Who: »The Visitation« |

### BBC WORLD

| | |
|---|---|
| 00.00 | News – Weather |
| 00.30 | HARDtalk |
| 01.00 | News – Weather |
| 01.30 | Holiday Special: »Italy« |
| 02.00 | News – Weather |
| 02.30 | World Review – Beyond 2000: »The Americas« |
| 03.00 | News – Weather |
| 03.30 | Asia Today |
| 03.45 | World Business Report |
| 04.00 | News – Weather |
| 04.30 | HARDtalk |
| 05.00 | News – Weather |
| 05.30 | Top Gear |
| 06.00 | News – Weather |
| 06.30 | World Review – Beyond 2000: »The Americas« |
| 07.00 | News – Weather |
| 07.30 | HARDtalk |
| 08.00 | News – Weather |
| 08.30 | World Review – Beyond 2000: »South East Asia« |
| 09.00 | News – Weather |
| 09.30 | HARDtalk |
| 10.00 | News – Weather |
| 10.30 | Holiday Special: »Italy« |
| 11.00 | News – Weather |
| 11.30 | World Review – Beyond 2000: »South East Asia« |
| 12.00 | News – Weather |
| 12.30 | HARDtalk |
| 13.00 | News |
| 13.15 | World Business Report – Weather |
| 13.30 | Top Gear |
| 14.00 | News – Weather |
| 14.30 | World Review – Beyond 2000: »South East Asia« |
| 15.00 | News – Weather |
| 15.30 | Asia Today |
| 16.00 | News – Weather |
| 16.30 | HARDtalk |
| 17.00 | News |
| 17.15 | World Business Report – Weather |
| 17.30 | Talking Movies |
| 18.00 | News – Weather |
| 18.30 | World Business Report |
| 18.45 | World Sport |
| 19.00 | News – Weather |
| 19.30 | HARDtalk |
| 20.00 | News – Weather |
| 20.30 | Click Online |
| 21.00 | News – Weather |
| 21.30 | World Business Report |
| 22.00 | News – Weather |
| 22.30 | World Review – Beyond 2000: »Korea« |
| 23.00 | News – Weather |
| 23.30 | World Business Report |
| 23.45 | Asia Today |

### 3 VIASAT

| | |
|---|---|
| 05:00 | Børne-hjørnet med Disney |
| 07:30 | TV-shop |
| 08:45 | Blossom |
| 09:10 | Alias Smith & Jones |
| 10:00 | Hvide Løgne (G) |
| 10:25 | Horton-sagaen (G) |
| 11:20 | Horton-sagaen |
| 12:10 | Melrose Place - classic |
| 13:05 | Vild med dig |
| 13:30 | Panter-tanter |
| 14:00 | Mig og fremtiden |
| 14:55 | Baywatch |
| 15:45 | Min kære familie |
| 16:10 | Ricki Lake |
| 17:10 | Dagens Nyheder på TV3 |
| 17:30 | Susan - sød og single |
| 18:00 | Alle tiders barnepige |
| 18:30 | Hvide Løgne |
| 19:00 | Torsdagsbio: Fars fede fridage |
| 21:00 | Heksene fra Warren Manor |
| 21:50 | Action |
| 22:20 | Dagens Nyheder på TV3 |
| 22:30 | Drøm videre |
| 23:00 | Nash Bridges |
| 23:50 | Kojak |
| 01:00 | Strømer i L.A. |
| 01:25 | Ti tommelfingre |
| 01:50 | Simpsons |
| 02:15 | Ellen |
| 02:40 | Ricki Lake (G) |
| 03:35 | Godnat |

### ÚTVARP FØROYA

| | |
|---|---|
| 07.00 | Tíðindi |
| 07.05 | Morgunlestur |
| 07.15 | Barnaløtan Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri |
| 07.30 | Tíðindi |
| 07.35 | Morguntónleikur |
| 08.00 | Tíðindi |
| 08.03 | Morgunrásin |
| 09.00 | Tíðindi |
| 09.03 | Morgunrásin |
| 09.50 | Morgunlestur (e) |
| 10.03 | Fyrrapartsløg Kim Hansen stílar fyri |
| 11.00 | Tíðindi |
| 11.03 | Dýrmæta lív (e) Jørgen Frantz-Jacobsen í glottaljósi úr brøvum hansara. 11. partur. William Heinesen tók saman. Christian Matras føroyskaði. Jógvan Arge og Sverri Egholm lesa. |
| 11.30 | Undir døgurða |
| 12.00 | Veðurtíðindi |
| 12.02 | Middagstónleikur |
| 12.15 | Skráin og lýsingar |
| 12.20 | Tíðindini |
| 12.40 | Døgurðatónar |
| 13.00 | Í grannalagnum (e) |
| 13.30 | Tónleikur |
| 14.00 | Kjaktorgið (e) |
| 15.00 | Tíðindi |
| 15.03 | Frívaktin Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri |
| 16.00 | Tíðindi |
| 16.03 | Vangamynd Annlis Bjarkhamar og Jóhannes Miðskarð leggja til rættis |
| 17.00 | Tíðindini |
| 17.05 | Í Víngarðinum |
| 18.05 | Barnaløtan (e) Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri |
| 18.25 | Skráin og lýsingar |
| 18.30 | Tíðindini |
| 19.00 | Hetjur í Skriftini Armgarð Arge leggur til rættis |
| 19.30 | Harmonikutónleikur Flóvin Jacobsen skipar fyri |
| 20.30 | Á sanganna veingjum Gunnvør Poulsen stílar fyri |
| 21.00 | Tíðindi |
| 21.05 | Dagsetur Ginna Midjord skipar fyri |
| 22.00 | Rák Anita Ottosen stílar fyri |
| 23.00 | Tíðindi |

### Rás 2 FM 102 FM 107

*– Eingin skrá komin*

### Lindin

| | |
|---|---|
| 13.00 | Byrjan – Dagsskrá |
| 13.15 | Okkara dagliga breyð |
| 13.30 | Sjómanssendingin Vitin (e) |
| 14.30 | Tónleikur fyri børn |
| 15.00 | Tónleikasending við verti |
| 17.00 | Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku |
| 18.00 | Dagsins Orð |
| 19.00 | Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending. |
| 20.00 | Tónleikur fyri børn |
| 20.30 | Okkara dagliga breyð |
| 20.55 | Dagsins Orð |
| 21.00 | Bønarlinjan við gesti. Bønarevni kunnu ringjast inn frá 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 Vertur tykkara hesarferð: Jenis av Rana. |
| 00.00 | Vit gevast (uml.) |

## Torsdagsbio: Fars fede fridage

*– Amerikanskur skemtifilmur frá 1997*




Jack er ein superstressaður teldusølumaður, sum hevur trupulleikar við at selja tær vánaligu vørurnar hjá fyritøku sínari. Og heima klárar hann ikki at larmin frá sínum hyperaktivu børnum.

So tá kona hansara játtar at fara á tjaldlegu við børnunum, er Jack eydnusamur. Endiliga friður og eingin larmur. Men tíverri er friður tað einasta, hann ikki fær.

## Heksene fra Warron Manor

*– Amerikansk dramarøð (Charmed)*




Abraxas stjelur Bók Skugganna og fer at ógilda fleiri bannsetingar, og tað hevur við sær, at fleiri fíggindar hjá Prue, Piper og Phoebe koma afturí aftur.

Tað gerst teimum eisini greitt, at Abraxas møguliga fer at ógilda ta bannsetingina, sum gevur teimum teirra gandamegi – men tað er Prue ikki so kedd av. Hon heldur enn, at hon hevði ábyrgdina av, at Andy doyði.



# Bjartskygni í Suðuroynni um oljuútgerðarhavnina

ÚTGERÐARHAVNIN

*Jan Müller*

Felagið, sum fær samlaða tilboðið uppá útgerðarvirksemið, fær úr at gera, nú tíðin er so stutt til fyrsta boringin skal byrja. Umleið 1. mars verður greitt, hvat felag verður tikið út til uppgávuna, og longu 1. apríl byrjar virksemi av álvara. Hetta er ikki nógv tíð. Vit hava spurt ein av umsøkjarunum, og helst tann einasta, sum hevur valt at leggja alt útgerðarvirksemið í Suðuroynni, Norserv á Tvøroyri, um teir - fáa teir uppgávuna - verða klárir til tíðina. Steen

Hansen er stjóri í Norserv: - Vit skulu nokk vera klárir.

Og er tað so, at Norserv verður hepni vinnarin, hvat Steen Hansen sjálvandi ikki ivast í, so verður alt fyri eitt farið til verka. Eftir stutta tíð koma kranar, truckar, konteynarar, tangar o.a. til Drelnes.

Norserv ætlar sær at bjóða oljufeløgunum at byggja goymslubygningar á keiøkinum, men tað veldst um, hvat oljufeløgini ynskja. Hann sigur, at teir at byrja við kunnu koma við eini tjaldloysn. Alt fyri eitt verður so farið at grava at planera baklandið, sum hann málber seg. Eisini fara skeið at verða hildin.

Talan verður ikki um nógv arbeiðspláss í byrjanini, kanska eini tíggju fólk. Steen Hansen sigur, at á Drelnesi er alt klárt til at taka ímóti komandi virkseminum. Hann váttar, at tað eisini er nokk til av baklandi, tá basin í framtíðini skal byggjast út til møguliga framleiðslu á feltinum. Steen Hansen heldur annars, at tað er ótrúligt, so stórur áhugin millum suðuroyingar hevur verið fyri hesum tiltakinum, bæði millum manna, millum virki og fakfeløg.



*Steen Hansen, ein av undangongumonnunum at fáa Suðuroynni oljuútgerðarhavnina*

*Mynd jan*

### Góð kort

*– Men hvussu góðan møguleika hevur Suðuroyggin at fáa basan - útgerðarhavnina?*

– Vit hava eitt samlað konsept, sum ger, at vit standa við sera góðum kortum. Hetta byggir m.a. á royndir okkara í 22 ár í Esbjerg.

Steen Hansen heldur ikki, at hann sigur ov nógv, tá hann vísir á, at teir eru sera frammarlaga, tá tað snýr seg um trygd. Nakað, sum hann veit oljufeløgini leggja sera stóran á.

Nú er tað ymist, hvussu tær ymsu havnirnar brynja seg út og hvussu tey ymsu feløgini og samtøkini eru samansett. Í Runavík leggja teir alstóran dent á, at tað eru føroyskar fyritøkur, sum standa aftanfyri slíkt projekt. Tí stendur eisini stórur partur av vinnulívinum í oynni aftanfyri verkætlanina "Atlantic Supply Base".

Tað hevur so verið ført fram, at í Suðuroynni er talan um donsk áhugamál og er tann verkætlanin ein roynd hjá AP Møller at koma inn í føroyska oljuvinnu gjøgnum bakdyrnar við at brúka føroyskar strámenn! Hesum vísir Steen Hansen avgjørt aftur.

– Norserv er eitt føroyskt felag við tveimum partaeigarum, Danbor og Richard B Thomsen, so talan er ikki um nakrar strámenn. Vit fara inn í hetta við tí greiða málsetningi, at so nógvir føroyingar sum til ber skulu starvast við hesum projekti. Men vit eru eisini noyddir at vera realistiskir sigur Steen Hansen og vísir til støðuna, tá teir í Danmark fyri fyrstu ferð fóru undir slíkt virksemi. Tá vórðu teir noyddir til at keypa ekspertisu og know how uttanífrá men hugdu samtíðis eftir, hvussu teir útintu hesar uppgávur. Nakað tað sama fer eisini at henda í Føroyum.

### Góðar umstøður

– Vit hoyra oftani fólk siga, at tað er umráðandi, at ein slíkur basi liggur sentralt og nærhendis ymsu tænastustovnarnar í samfelagnum, og hetta halda tey ikki man kann siga um Suðuroynna!

– Suðuroyggin hevur eitt nútímans sjúkrahús. Her er ein tyrlupallur, sum er vælegnaður til endamálið. Suðuroyggin hevur so eisini víst ein sera stóran áhuga fyri hesum projektinum, so vit halda, at útgerðarhavnin kemur til rætta plássið.

Steen Hansen dylur ikki fyri, at tað kann fáa alstóran týnding fyri alla oynna, um avgjørt verður at leggja útgerðarstøðina har og um olja so verður funnin. Hann vísir á, at nógvar kanningar eru gjørdar um positivu avleiðingarnar sum oljuútgerðarhavnin hevur havt fyri Esbjerg. Í dag eru umleið 3500 menniskju knýtt av oljuvirksemi so ella so.

Steen Hansen heldur tí, at tað átti at havt nógv at siga fyri búsetingina og framtíðina hjá Suðuroynni, um oljuútgerðarhavnin endaði har - ikki minst tað nú verður tosað so nógv um at menna og varðveita búsetingina uttan fyri miðsteðarøkið.

– Men tað eru tey, sum siga, at útgerðarstøðin eigur at liggja har allar skrivstovurnar og umsitingin er. Til hetta sigur Steen Hansen, at flestu av skrivstovunum hjá oljufeløgunum liggja í Keypmannhavn, 300 kilometrar burturi frá Esbjerg. Soleiðis hevur tað verið í 22 ár og tað virkar fínt.

### Tíð er peningur

Uppá fyrispurning um tað er eitt gott kort at hava at liggja næst leitiøkjunum sigur Steen Hansen, at hetta hevur kanska meira at siga fyri oljufeløgini. -Tíð er pengar, og tess skjótari man koma frá feltinum til basan, tess fleiri pengar eru at spara. Hann vísir á, at tað tekur fimm tímar longri at sigla til Havnar enn til Drelnes frá leitiøkjunum sunnanfyri. Sjálvur heldur hann nógvir pengar eru at spara við at hava útgerðarstøðina so tætt leitiøkjunum sum gjørligt, tá hugsað verður um, hvat tað kostar at hava supplyskip í tænastu.

Tað eru nú umleið fimm ár síðani, at Steen Hansen og fólk í Suðuroynni settu seg saman at tosa sum møguleikan at leggja ein basa á Drelnesi og hóast hesa drúgvu tíð, er Steen Hansen bjartskygdur, nú møguliga endaliga avgerðin skal takast. Men tað eru heldur ikki smáfeløg, ið Norserv kappast við, verður hugsað um eitt nú risastóra skotska útgerðarfelagið Asco, sum samstarvar við Tórshavnar Skipasmiðju. Men Steen Hansen tykist ikki at óttast tey. Hann heldur Danbor hevur so góðar og drúgvar royndir, at teir eiga at verða førir fyri saman við suðuroyingum at vinna útbjóðingina. Hann er sannførdur um, at teir verða eins væl førir fyri at koma við einum góðum og rímuligum tilboð sum eitt nú hini stóru feløgini, sum fara at bjóða.



*Páll Vang, fyrrv. býráðsformaður á Tvøroyri hevur lagt stórt arbeiði í at fáa oljuútgerðarhavnina til Suðuroynna. Her avdúkar hann modell av útgerðarhavnini*

*Mynd: jan*

## Hørð kapping um útgerðar havn

TÍÐARÆTLAN OG ÚTGERÐARHAVN

*Jan Müller*

Tað verður eftir øllum at døma ein hørð kapping um at gerast Føroya framtíðar oljuútgerðarhavn. Hóast sera avmarkað virksemið verður í leitingarskeiðinum tvs. komandi 3-5 árini, so bendir nógv á, at tann havnin, sum verður vald at umsita meginpartin av virkseminum longu frá byrjan av, verður endaliga útgerðarhavnin næstu 30-60 árini, um so er, at olja verður funnin.

Nettupp henda sannroynd ger kappingina so harða, nú ein av operatørunum, sum hevur fingið leitiloyvi, Statoil, kannar førleikan hjá teimum seks feløgunum, ið bjóða seg fram at átaka sær ábyrgdina av komandi virkseminum. Alt eftir hvat felag verður valt til uppgávuna verður tað eisini gjørt av, hvør havn í Føroyum fer at verða komandi oljuútgerðarhavnin. Tað skilst, at flestu av feløgunum peika á eina havn í Tórshavnar Kommunu ella Runavíkar Kommunu til oljuhavn

15. desember høvdu seks feløg og samtøk latið inn tilfar til prekvalifisering tvs. tilfar, sum skal vísa, um feløgini eru før fyri at verða við í tilboðsgeving uppá basavirksemið. Tíðarætlanin er so tann, at feløgini, sum sleppa gjøgnum nálareygað, tvs. verða vald út til at kunna geva tilboð, frá viku 2 fáa tríggjar vikur til at gera og lata tilboðini inn. Í viku 9 tvs. umleið 1. mars verður so avgjørt, hvat felag ella samtak fær ábyrgdina av øllum tí samlaða útgerðarvirkseminum. Longu ein mánað seinni skal verða klárt til fara til verka á útgerðarstøðini.